# BØNARLØTAN

MAI 2023 38. árg.

## *1. Mánadagur* *Josva 24.1-18*



*Sangkórið í Ebenezer*

Sangkórið í Ebenezer vitjar soleiðis í Danmark: 26. mai kl. 16:30 í Tylstrup Frikirke og kl. 19 í Malta í Hirtshals. 27. mai kl. 13 í Give Baptistkirke og kl. 17 í Kristuskirken, Odense. 28. mai í Keypmannahavn: kl. 11 í Kristnastovu og kl. 19:30 í Føroyahúsinum. 29. mai kl. 19 í Skovlunde Frikirke. 30. mai kl. 14:30 á Ríkissjúkrahúsinum. Biðið, at Harrin varðveitir kórið á ferðini og signar sangin.

**KRINGVARPIÐ**
4. juni kl. 17 útvarpsmøti, Ebenezer

**EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á www.evr.fo)**
Sunnukv. kl. 21.00. Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskv. kl. 21.00. Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

## *2. Týsdagur* — *Jud. 1-25*

**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**
Í Bønarløtuni fyri mars stóð, at húsini hjá mær í Porkeri eru umvæld. Hetta er misskilt. Timburmaðurin er ikki byrjaður enn, men tað verður vónandi skjótt. Biðið, at alt skal ganga væl við umvælingini. Fyrst í mai kemur umsetingarráðgevi úr USA at kanna 1. Mósebók, sum er nærum liðug, og sum síðani skal prentast saman við Lukasevangeliinum og onkrum øðrum. Biðið, at teldan heldur, til eg fái eina nýggja, og at Harrin styrkir.

**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**
Altjóða NTM leiðslufundir verða 1-5. mai: *Hvussu eggja vit best trúboðarum okkara í verkinum?* Biðið fyri teimum trúgvandi í Mangseng. Samkomunum tørvar vísdóm, sum tey hugsa um tað yngra ættarliðið.



## *3. Mikudagur* — *Josva 24.19-33*

**FRANKARÍKI, Nantes, OM**

**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 12, Leah 9, Abigail 4**
Vit gleðast um barnamøtini í grannalagnum, har fleiri nýggj fólk vóru við. 74 hava teknað seg til samkomuvikuskifti í mai, og 3 ungdómar verða doyptir. Biðið fyri familju og vinum, sum koma til dópin - fleiri teirra eru ikki trúgvandi.

**Elam Ministries, Evropa**
**Margretha Højgaard Poulsen**

**ZAREPTA**
Várlegan fyri fólk við breki verður 5-7 mai.

***4. Hósdagur*** ***Sálm. 78.32-72***

**OM, LOGOS HOPE, TeenStreet**



OM Missionsstevna verður í Lívdini og í Oasuni í Hoyvík 4-6. mai. Evnið er *Missión, hvat kann eg gera?* Á skránni verða ymisk møtir, bønamøtir, ungdómsmøtir, verkstovur og seminar. Gestir verða Frida og Ramy Makar, ið hava verið trúboðarar í Miðeystri í 16 ár, og Weronika Czajko, leiðari fyri OM í Póllandi við ábyrgd fyri arbeiðnum við flóttafólkum úr Ukraina. Ellindur Abrahamsen er skipari á Doulos Hope, sum er í Malaysia. Esther Dam Hansen er umborð á Logos Hope, Pætur Midjord úr Fuglafirði fer umborð sum maskinmaður næstu tveir mánaðirnar, og Eik Klæmintsdóttir er komin heim aftur. Biðið fyri teimum øllum.

*Í dag fyllir Noah Flanagan 14 ár

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Noah 17, Lydia 6**



Samkomulega verður 4-7. mai, har Anne og John Merson úr Aberdeen vitja og hava bíbliutímar. 29. mai hevur Ebenezerkórið sangløtu í Skovlunde Frikirke. Biðið, at Harrin signar.

## *Dýri biðidagur* *Heb. 12.1-11*

**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

Altjóða nevndarfundir eru 1-5. mai í Florida, og 8. mai tali eg í Orlando. 22-29. mai eru vit í Kuala Lumpur, Malaysia. 28. mai tali eg í Bangsar Gospel Center. 29. mai - 16. juni verða vit í Filipsoyggjum, har eg tali á trúboðarastevnu. Biðið fyri okkum.

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Biðið fyri teimum nógvu, sum komu til møtini á páskum, og sum hoyrdu evangeliið fyri fyrstu ferð. Takk fyri forbøn.

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**

**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

Biðið, at Gud signar legurnar, at børn og ung koma, at vit fáa trúgvandi starvsfólk og fyri fíggjarligu støðuni.

## *6. Leygardagur* *2. Mós. 16.22-36*

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**
Í mai undirvísi eg á málfrøðiskeiði á Moorlands bíbliuskúlanum í Suðuronglandi. Biðið eisini fyri Sue og mixtectoyminum, ið arbeiðir við týðingini í Oaxaca, Meksiko.

## *7. Sunnudagur* *Heb. 12.12-29*

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**
Vit eru í PNG til 9 mai, har eg gjøgnumgangi siðstu brøvini í NT saman við ráðgevanum. Aftaná vitja vit samkomuna í Sorimi.



## *8. Mánadagur* *2. Mós. 17.1-16*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**
Nógv tilfar til Stevn er dagført. Hetta er orkukrevjandi. Minnist Joy, sum er í Pakistan.



**OM, SUÐURAFRIKA,**
**Mamelodi Aids Hope**
**Tanja og Kurt Abrahams**

*Í dag fyllir Terji í Prestgarði 11 ár

## *9. Týsdagur* *Heb. 13.1-25*

**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**



Eftir góða og uppbyggjandi tíð heima eru vit aftur í Kanada, har eg fyrireiki tilfar til Rómbr. á kankanaey. Biðið, at hetta verður til signing fyri samkomurnar í fjøllunum, har kankanaeyfólkið býr.

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Hanna 15**

## *10. Mikudagur* *2. Mós. 18.1-27*

**FØROYAR**
**Vanja og Svein í Prestgarði**
**Svend 14, Terji 11, Petra 9**

10-30. mai luttaki eg á ymiskum evangeliskum tiltøkum í Noregi í kristiansandøkinum, syngi inn norska fløgu og tosi við norskt radio. Biðið, at Harrin signar og styrkir, og minnist eisini børn okkara.

**Birgit og Svenning av Lofti**
**Atlantic Mission, Juvel II**
**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**

**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 12, Tabita 9, Debora 7, Natan 4**

## *11. Hósdagur* *Sálm. 79*

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**

Biðið, at vit fáa størri hjarta at biðja fyri føroyingum her um leiðir.

## *12. Fríggjadagur* *Op. 12.1-18*

**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 17, Rebekah 15, Lydia 13**



Starvsfólk verða lærd upp at nýta TWR (Trans World Radio). Eg geri tær síðstu rættingarnar í handbókina *Funding the Family Business* til nýggjar trúboðarar.

## *13. Leygardagur* *2. Mós. 19.1-25*

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

Bólkurin *Vinir Jesusar*, ið arbeiðir millum saafifólkið í Senegal, hevur virkað væl í 6 bygdum. Samstarv verður eisini við aðrar missiónsbólkar aðrastaðni. Regluligir fundir fyri yngri fólk í Onesimusarhúsi byrja 13. mai.

**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**

Vit eru takksom fyri arbeiðsfólk til viðlíkahald v.m. í mai/juni og starvsfólk til legurnar í juli. Tó manglar skipari til týdningarmiklu tænastuna at sigla børnini til og frá legunum

eins og fólk at hjálpa til við bíbliutíma, siga søgu og til kvøld-setuna á ungdómsleguni.

## *14. Sunnudagur* *Op. 13.1-18*

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

Mamma Daniel doyði stutt fyri páskir. Biðið um troyst og vegleiðing, sum vit royna at varðveita sambandið við vinirnar í Qasigiannguit og við Pastor Fred í Uganda.

**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**

## *15. Mánadagur* *2. Mós. 20.1-26*

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

Tað er gott at síggja næmingar á bíbliuskúlanum vaksa í Gudi og taka góðar avgerðir, eisini uttanfyri flokshølið. Í fjør fekk piaroafólkið bíbliuna á egnum máli. Eitt toymi frá ættarbólkinum og Nurimar arbeiða við at gera nýggjar og betri skúlabøkur.

**FØROYAR**

**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**



## *16. Týsdagur* *Op. 14.1-20*

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**
Ivor hjálpir til við uppíbyggingini. Mamma hansara hevur nú fingið fulltíðarrøkt, og Guðrun leitar eftir parttíðarstarvi. Biðið fyri samkomuni, og at sonur okkara Tim finnur arbeiði.

## *17. Mikudagur* *2. Mós. 21.1-19*

**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**



17. mai fer Juvel II av Klaksvík til Grønlands. 26-29. mai fara vit saman við samkomuni í Nuuk á legu inni í firðinum, har m.a. Jákup Hansen úr Kristnastovu luttekur. Frá 30. mai vitja vit bygdirnar. Biðið, at Harrin signar tíðina saman við samkomuni, ferðina kring Grønland, og at menniskju verða frelst og endurnýggjað.

## *Kristi Himmalsferðardagur* *Es. 61.1-11*

**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 11, Emma 6**
Vit vegleiða og stuðla familjum í samkomuni, sum uppliva andalig álop fyri tíðina. Biðið, at Harrin verjir samkomuna.

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 9, Micah 9**

## *19. Fríggjadagur* *Es. 62.1-12*

**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**
Toymi frá samkomum í Istanbul hjálpa framvegis regluliga í jarðskjálvtaraktu økjunum; tey eru væl skipað, og tørvurin er stórur. Hesi trúgvandi eru livandi vitni, sum eisini lurta og biðja við teimum, sum ynskja tað. Nógv fremmand vitjaðu páskamøtini – biðið, at tey vilja hoyra meira.

## *20. Leygardagur* *2 Mós. 21.20-36*

**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 5, Timon 3**
Vit eru aftur í PNG, men pápa barst frá at vitja í Kovol, tí tyrlan var til eftirlit. Biðið, at nýggja tyrlan, sum kemur seinni í ár, fer at roynast okkum væl.



## *21. sunnudagur* *Op. 15.1-8*

**FØROYAR**
**Danjal og Synnøve av Rana**
**Benjamin 14, Anna Emilie 8, Lukas 2**
Biðið, at eldru børnini, sum koma í *UngLív* í Lívdini fríggjakv. kl. 20, trívast og fáa góðar vinir, men serliga at tey møta Jesusi. Biðið, at fleiri tekna seg sum leiðarar til TeenStreet í heyst.

**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen,**
**Josva 13, Ester 12, Samuel 8**
**– Dora og Niels Pauli Nónstein, Andreas 13, Kristina 12**

*Í dag fyllir Rio Mortensen 4 ár

## *22. Mánadagur* — *2. Mós. 22.1-15*

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 11**

Trúboðarafamiljum í Indonesia og Teilandi tørvar heimalærarar til komandi skúlaárið. Biðið fyri hesum.



**ONGLAND, Taunton**
**Dorit og Simon Marshall**

*Í dag fyllir Judah Flanagan 8 ár

## *23. Týsdagur* — *Op. 16.1-21*

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 2, Selah Rose 0**

Vit flyta til Papua seinni í mai og takka fyri tíðina í Java. Biðið, at flytingin gongur væl, at vit falla væl til og læra mál og mentan skjótt.

*Í dag fyllir Nya Flanagan 15 ár
*Í dag fyllir Hanna Sharp 15 ár

## *24. Mikudagur* *2 Mós. 22.16-31*

**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 6, Jude 4, Evelyn 3**

Eg dugi málið frá uppvøkstrinum og taki mær tí mest av børnum o.ø., meðan Lili hugsavnar seg um at læra málið. Innleiðslan her endar skjótt, og vit fara so 2 vikur til høvuðssætið í Gorka, áðrenn vit verða send inn í ein ættarbólk í 6 vikur. Biðið, at børnini og vit megna allar hesar broytingarnar.



**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 15, Noah 14, Karis 9, Judah 8, Ethan 5**

## *25. Hósdagur* *Sálm. 80*



**DANMARK, Kristnastova**
**Sólva og Jákup Hansen**

Biðið fyri tænastuni á Sjúklingahotellinum, hvørt týskv. í ítrivsrúminum og annaðhvørt hóskv. til andaktina. Jákup fer til Grønlands á hvítusunnu í nakrar dagar at hjálpa til við Juvel II og í samkomuni í Nuuk. Biðið, at ferðin eydnast og verður til signing.

*Í dag fyllir Noa Berghamar 17 ár

## *26. Fríggjadagur* *2. Tim. 1.1-18*

**DANMARK, Hirtshals, Malta**

**Anna og Hans Djurhuus**



Fríggjad. 26. mai kl. 19 vitjar Ebenezerkórið á Malta. Biðið, at vitjanin verður til signing.

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 14**

## *27. Leygardagur* — *Orðt. 9.1-18*

**DANMARK, Kolding**
**Anne og Jan Zachariassen**

Síðst í mai vitji eg Amerikanska Bíbliugrunnin, ið stuðlar bíbliuútgávu til deyv kring heimin. Stuðulin er roknaður í mun til tal av deyvum í landinum, so um Føroyar skulu hava alt NT á deyvamáli, so má fígging eisini útvegast. Biðið fyri okkum.

## *Hvítusunnudagur* — *2. Tim. 2.1-26*

**Susan og Øssur Berghamar**



Vit gleða okkum at Ebenezerkórið vitjar á hvítusunnu. Kórið syngur í Føroyahúsinum hvítusunnud. kl. 19.30 og í Skovlunde Frikirke 2. hvítusunnudag kl. 19. Harumframt syngja tey í forhøllini á Ríkissjúkrahúsinum týsdag seinnapart - sama dag, sum tey fara heimaftur. Sigið familju og vinum her frá vitjanini og biðið, at hon skal vera til signing.
berghamar@kristnastova.dk

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**
Á hvítusunnu verður samkomulega í Birkedal í Undløse. Vit vóna, at nógv tekna seg, og at legan verður góð og uppbyggjandi.

| *2. Hvítusunnudagur* | *Orðt. 10.1-17* |
|---|---|



**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 11, Noah Kristian 9**
Vit gleðast um, at fólk leggjast aftrat toymi okkara, men vit biðja framvegis um fólk við fyrisitingarligum førleikum.

| *30. Týsdagur* | *2. Tim. 3.1-17* |
|---|---|



**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**
Ætlanin er at arbeiða saman við umsetarum á Mindanao og Palawan, og vónandi ber eisini til at vitja á Balabac.

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Victoria 16, Emma Grace 15, Jónatan 13, Markus 11, Evita 8, Joy 6**
Biðið fyri okkum, nú vit eftir longri steðg fara aftur til Meksiko 1. juni.

*Í dag fyllir Evelyn Poulsen 3 ár

## JAPAN
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 13, Nana 11, Louie 9, Rio 4**




Útgevari KBS (Kristniboðssambandið)
Blaðnevnd Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
Avgreiðsla Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057
Uppseting Grafikmaster, tel. 502022
Myndasavn info@grafikmaster.fo
Prent Føroyaprent, tel. 314555
Teldupostur prayerservicefo@gmail.com
Heimasíða www.kbs.fo


NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!

## NÝGGJ BÓK!

**32 síður 130 kr.**

Ert tú nakrantíð boðin til ein føðingardag, at hyggja eftir fótbólti, ella til eitt stórt brúdleyp? Hetta er heimsins besta innbjóðing, men hvussu fer tað at vera í himlinum? Hvat fara fólk at gera har í allar ævir? Joni Eareckson Tada sigur frá tí glitrandi, ljómandi lívinum, sum Jesus bjóðar okkum, sum trúgva á Hann.




FORLAGIÐ LEIRKERIÐ

Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo